# NORÐURLENDSKUR RITHØVUNDASKÚLI FYRI UNG 2018





30. juli - 4. august 2018 bjóðar Nordens folkhøgskole á Biskops-Arnö í Svøríki skrivihugaðum ungum millum 15-18 ár úr øllum norðurlondum til norðurlendskan rithøvundaskúla fyri ung. Skeiðið er ókeypis, og heilir sjey norðurlendskir rithøvundar skipa fyri vikuni á tremur við lesing, skriving, tekstsamrøðu og høvi at hitta onnur ung. Undirvísingin fer fram á skandinaviskum máli og enskum. Hetta er eitt serstakt høvi hjá tær, sum hevur hug at skriva, og sum leingist eftir at hitta onnur við somu dreymum og áhugamálum.

Umsóknarfreist er 15. apríl 2018.

Biskops Arnö

Nordisk Ministerråd

NORDEN

UM RITHØVUNDASKÚLAN

Ida Linde og Athena Farrokhzad hava ábyrgd av skeiðsinnihaldinum. Tær eru báðar rithøvundar, umsetarar, ummælarar og lærarar á Nordens forfatterskole Biskops-Arnö. Tær báðar og fimm aðrir rithøvundar úr teimum norðurlendsku málsøkjunum vera lærarar á rithøvundaskúlanum hesa vikuna.

Teir sjey rithøvundarnir fara at býta út vitan og royndir í felag og leggja upplegg og framløgur til rættis við støði í royndum og vitan hjá luttakarunum. Undirvísing og samrøða verða á skandinaviskum og enskum. Á tann hátt verður møguligt hjá luttakaranum at bøta um sítt egna mál gjøgnum sína fagurbókmentaligu skriving, umframt at fatanin av hinum norðurlendsku málunum verður styrkt gjøgnum felags samrøður um bókmentir.

Skráin fevnir um ymiskar skrivivenjingar, har møguleiki verður at royna seg, annaðhvørt uppgávurnar skulu loysast hvør fyri seg ella í bólki. Vit fara eisini at kava niður í ymisk bókmentalig øki. Um kvøldið er tað møguligt at lesa upp fyri hvørjum øðrum í Biskoppakøkinum.

Týdningarmesti tátturin í vikuni er tekstsamrøðan, sum er siðvenja í norðurlendsku rithøvundaútbúgvingunum. Tekstsamrøðan er ein háttur at læra seg at lesa bæði egnar tekstir og tekstir hjá øðrum til tess at gerast ein betri rithøvundur.

FRÍTÍÐ

Uttanfyri undirvísingar- og skrivitíðir er nógv ymiskt virksemi at velja millum. Tú kanst Tú kanst svilmja í Mälaren, fara í baðstovu, spæla rundbólt, fótbólt og onnur spøl. Haraftrat er tað møguligt at rógva í kano, fara í skógin, venja í venjingarhølunum ella spæla "bandy" í fimleikahøllini.

Á skúlanum er eitt einastandandi bókasavn, sum er opið alt samdøgrið, og sum hevur bøkur á frummálinum úr øllum norðurlondum. Luttakararnir á rithøvundaskúlanum fara at nýta hetta bókasavnið nógv og soleiðis fáa betri kunnleika til norðurlendskar bókmentir.



GRUNDARLAG

Gomul siðvenja hjá norðurlendskum rithøvundum er at hittast á Biskops Arnö. Síðan 1960 hava vit skipað fyri bókmentaligum námsskeiðum og ráðstevnum, og nógvir viðurkendir norðurlendskir rithøvundar hava verið á skeiði her. Her er tað at vit finna Nordens forfatterskole.

TÍÐ, STAÐ OG FERÐ



Tíð: 30. juli - 4. august 2018
Stað: Nordens forfatterskole á Nordens folkhögskola Biskops Arnö, við Mälaren í Bålsta (uml. 60 km frá Stockholm)

Biskops Arnö
746 93 BÅLSTA
SVERIGE

Farleið og kort, sí:
www.biskopsarno.se/vagbeskrivning

Ferðin: ferðin til Biskops Arnö er øll ókeypis. Ferðaskrivstovan Winslow Travel setur seg í samband við luttakararnar hvør sær og bíleggur flogferðina. Av flogvøllinum verður farið við hýruvogni til skúlan.

MÁLBÓLKUR
Ung millum 15 – 18 ár úr øllum Norðurlondum.

UMSÓKNARFREIST
Umsóknarfreist: 15. apríl 2018
Umsóknin skal innihalda:

- Ein tekst, 1-2 A4-síður, sum tú sjálv(ur) hevur skrivað. Tema: "Eg – ein rithøvundur".
- Navn
- Adressu
- Telefonnummar
- Teldupostadressu
- Foreldur (um tú ikki er fylt(ur) 18 ár)

Umsóknin skal sendast til:
nffu@biskopsarno.se

Tað eru lærarar á Nordisk forfatterskole, sum gera av, hvør fær pláss á skúlanum.

ÓKEYPIS AT LUTTAKA
Rithøvundaskúlin fyri ung er ókeypis. Undirvísing, ferðakostnaður, matur og gisting verður goldið av Norðurlendska Ráðharraráðnum, sum hevur sett sær sum mál at stuðla barna- og ungdómsbókmentir. Tað einasta, sum tú sjálv(ur) skalt hava við, er lummapengar.

Meira kunning, send ein teldupost til:
nffu@biskopsarno.se
http://www.biskopsarno.se/forfattarskolan-for-unga-2018/